**Sørvágs Kommuna**
FR-380 Sørvágur . Tlf. +298 32004/33122 . Fax +298 32952

# KUNNINGARSKRIV 1996

31.12.96



**Fjórða** og seinasta árið hjá sitandi bygdaráði er nú komið til seinasta dag, og hvussu skurðurin hevur vignast í hesi fýra árini verður upp til hvønn einstakan sjálvan at avgera, men eins og farnu árini gera vit støðuna upp og royna at kunna okkara borgarar um hetta farna árið, íð nú skjótt um bert fáar tímar verður lagt aftur um okkum.

**Bygdaráðið** hevur havt fjúrtan bygdaráðsfundir í 1996 og viðgjørt u.l. níti mál, og viðgerðirnar hava verið umsóknir um byggiloyvir - stuðlar - umfiggingar - skattamál o.a.

**Fíggjarliga** ómegdin sum SÍ var komið í viðvíkjandi graslíkisvøllinum endaði, sum greitt frá í kunningarskrivinum í 1995, at kommunan ábyrgdaðist fyri einum láni í Føroya Banka uppá 1,2 mill. Hetta var í sept. 95 gjørt til trýára lán - uttanfyri kommunuloysnina - við u.l. 11,5% í rentu, og fekk bankin transport í skattarokningini fyri mánaðarliga gjaldinum á 39.000 kr.

**Kommunan** hevur í 1996 vegna batnandi gjaldføri megnað at útgoldið hetta lánið, og av hesum fingið eina nettosparing á kr. 93.000. Við at útgjalda - Saldo í juli 96 kr. 915.000 - verður ávirkanin á gjaldføri fyri trý ára skeiðið:

| | 1996 | 1997 | 1998 |
|---|---|---|---|
| Gjald av láni: | kr -915.000 | kr 0 | kr 0 |
| Sparing lánsgj. | kr 205.600 | kr 493.440 | kr 328.960 |
| Ávirkan: | kr -709.400 | kr 493.440 | kr 328.960 |

**Sum** áður fráboðað, so hevur Sørvágs Kommuna sagt upp leigusáttmálan við Føroya Fiskavirking, sum so skuldi enda við, at málið var lagt fyri ein gerðarætt til endaliga støðutakan, men vegna tey "turbulentu" viðurskifti, ið valda innan fiskiídnaðin í Føroyum í dag, hevur bygdaráðið samtykt at útseta málið viðvíkjandi leigusáttmálanum, til greiða er fingin á, hvat fer at henda við p/f Føroya Fiskavirking.

**Á vári** 96 fingu vit áheitan frá Akranesi í Íslandi um at gerast vinarbýir. Hesum hevur verið arbeitt við, og í mei mánaði vóru umboð fyri Sørvágs Kommunu í Íslandi og vitjaðu, og mánaðarskifti aug./sept. vóru umboð úr Akranesi her hjá okkum og vitjaðu, og 1. sept. 1996 var vinarbýarskjalið undirskrivað á Hotel Vágum.

**Einaferð** í áttatiárunum var lagdur ein kloakkleiðing av flogvøllinum oman gjøgnum bygdina og út í Bugin úti á Stongum, men av ymiskum orsøkum er henda leiðing ongantíð tikin í brúk, men nú er so ætlanin, at henda kloakk skal takast í brúk í komandi ári, og í hesum sambandi hevur bygdaráðið samtykt at loyva - eftir umsókn frá Miðvágs Kommunu og Landsverkfrøðinginum - Vatnsoyrum at binda í áðurnevndu kloakk. Samstarvsavtala um hetta verður undirskrivað í næstum.Eisini er ætlanin at fáa bundið mest møguligt av okkara bygd í hesa leiðing.

**Til tess** at loysa vatntrupulleikarnar í framtíðini er samtykt at leggja ein vatnleiðing oman til Sørvágsvatn. Tá Landsverkfrøðingsstovnurin fer undir at gera kloakkina úr Vatnsoyrum og niðan á flogvøllin, hava vit í avtaluni tryggjað okkum at fáa ein 10 tumma vatnrørleiðing í somu grøv. Vatnleiðingin verður gjørd í stigum, og fyrsta byggistig verður ein u.l. 1200 metra lang rørleiðing og mettur kostnaður er u.l. kr. 300.000.

**Tá** talan er um kommunusamanlegging eru meiningarnar sera ymiskar, men verður hetta veruleiki, so eru vit í hvussu er samd um, at ein natúrlig samanlegging hevði verið Sørvágur - Bøur - Gásadalur, og hava vit í hesum sambandi í vár sent Bø/Gásadals Kommunu skriv um at taka upp samráðingar okkara millum, men helst halda tey ikki hetta verða skilagóða loysn, tí tey hava ikki ønt okkum aftur.

**Sørvágs Kommuna** er B-partaeigari í p/f Vesturvón t.v.s. partaeigari uttan atkvøðurætt á aðalfundunum. Nú hevur felagið samtykt at seta á stovn egna søludeild, og var 06.12.96 stovnandi aðalfundur á Hotel Vágum. Partafelagið eitur VS Seafood og er partapeningurin 445.000 kr. í A-partabrøvum og 167.000 kr. í B-partabrøvum (kommunan). Sambært nýggju partafelagslógini ber ikki til at hava partabrøv uttan atkvøðurætt, so býtið her er, at hvør partaeigari eigur tíggju atkvøður fyri hvørjar 1.000 kr. hann eigur í A-partapeningi, og eina atkvøðu fyri hvørjar 1.000 kr. hann eigur í B-partapeningi. Sølumaður hjá felagnum eitur Árni Joensen.

**Sørvágs Kommuna** hevur í 96 fingið búmerki. Samtykt var at útskriva kapping, og var úrslitið, at Árni Jacobsen úr Klaksvík fekk 1. virðisløn á 4.000 kr. - Jákup Egholm Hansen úr Havn 2. virðisløn á 2.000 kr. og Herálvur Jacobsen úr Sørvági 3. virðisløn á 1.000 kr. Vinnarauppskotið sæst á forsíðuni á hesum skrivi.

**Fíggjarætlanin** fyri 1997 hjá Felagskommununi er kr. 346.900. Helvtin av útreiðslunum verða býttar millum kommunurnar í mun til skattskyldugu inntøkuna fyri árið 1995, meðan hin helvtin verður býtt í mun til fólkatalið í kommununum 01.01.96.Samlaða býtið fyri 1997 verður: Miðvágs Kommuna kr. 124.259,58 - Sørvágs Kommuna kr. 122.871,98 - Sandavágs Kommuna kr. 89.569,59 - Bø/Gásadals Kommuna kr.8.308,25 og Mykines Kommuna kr. 1.890,60.

**Viðvíkjandi** arbeiðinum, sum Felagskommunan byrjaði í 1994, at seta nevnd at kanna møguliga komandi oljuvinnu, er nú komið hartil at Felagskommunan og tær fýra kommunurnar í sunnaru helvt í Suðuroynni hava sett fólk í starv til at vegleiða og kunna kommunurnar/vinnulívið um eina komandi oljuvinnu o.a. Starvið er tíðaravmarkað til trettan mánaðir frá 01.12.96 at rokna, og hesin ráðgevi er Suni á Dalbø úr Miðvági. Útreiðslurnar til hetta starv verða goldnar við helvtarbýti til Felagskommununa og kommunurnar í sunnaru helvt í Suðuroynni

**Viðvíkjandi** arbeiði í bygdini hevur bara gingið framá, og her verður serliga hugsað um arbeiðsgongdina á havnalagnum við øktum og meira støðugum arbeiði. Her má eisini komast inn á teir fremmandu bátarnar, ið hava ligið her. Hetta byrjaði í sept. við avtalu um umvælingararbeiði til J.K.Joensen í Miðvági, men hevur síðani kastað ymiskt annað av sær eisini - í havnapengum/gjøldum hava teir givið okkum útvið 300.000 kr. Hesi skip hava eisini lagt pengar í kassan hjá Atlantsflog við trimum leigutúrum til Estlands og eisini hava teir bunkra olju her. Einasti máti at koma úr ómegdini er at økja um inntøkurnar, og her hava hesi skipini verið eitt gott og kærkomið íkast. Ætlanin er at halda áfram við samstarvinum í komandi ári, sum vónandi verður til gagn fyri tey fólk, ið her búleikast, og sjálvandi skulu tey fremmandu ganga undir okkara fyriskipanir og reglugerðir.

**Fíggjarætlanin** fyri 1997. Sambært lóg frá Føroya Løgtingi er skattaprosentið hjá føroysku kommununum læst fast millum 16 og 23%, harav skulu allar kommunur seta 1% í ein kommunalan kreppulánsgrunn, sum við lóg er settur á stovn fyri at hjálpa teimum kommunum, sum, hóast 23% í skatti, ikki klára seg fíggjarliga + sum eitt veðhald yvirfyri tí samlaðu kommunuskuldini (eftir ávísari skipan). Sørvágs Kommuna hevur nú samanlagt goldið út ímóti tveimum mill. í kreppulánsgrunnin. Fíggjarætlanin fyri 1997 var endaliga samtykt á bygdaráðsfundi 29.11.96.

| | 1997 | 1996 | 1995 | 1994 |
|---|---|---|---|---|
| Skattskyldug innt. | 84 mill | 71,5 m | 73 m | 68 m |
| Skattaprosent | 20%+1% | 20%+1% | 22%+1% | 22%+1% |
| Barnafrádráttur | 2500 | 2500 | 2500 | 2500 |
| Kirkjuskattur | 0,25% | 0,05% | 0,05% | 0,1% |

**Viðvíkjandi** tí grannskoðaða roknskapinum fyri hetta bygdaráðsskeiðið kunnu vit nevna, at roknskapurin fyri 93 vísir eitt avlop uppá kr. 1.449.000 - at roknskapurin fyri 94 vísir eitt avlop uppá kr. 1.740.000 og at roknskapurin fyri 95 vísir eitt avlop uppá kr. 425.000.

**Við** fólkatalinum er at siga, at vit frá síðsta kunningarskrivi 30.12.95 aftur eru kvinkaði uppeftir. Tann 30.12.96 búgva í Sørvági 891 fólk í mun til 880 í 95. Viðvíkjandi stóra talinum av tómum húsum í bygdini sær eisini ljósari út, soleiðis at skilja, at fleiri av hesum nú aftur eru fylt við lívi undir tekjuni, og er tað at fegnast um.

**Ein** føðingardag - ein av teimum vit ikki uppliva so nógvar av - høvdu vit í farna ári, tá Malla Olsen 22. apríl fylti 100 ár, og í tí sambandinum gav kommunan Ellisheiminum í Vágum eina gávu á 5.000 kr. til hátíðarhaldið.

**Týsdagin** 3. desember 1996 var bygda og skúlaráðsval, og var úrslitið hetta:
Tilsamans eru 650 íð hava atkvøðurætt í Sørvági, og av teimum vóru 453 á vali, og gevur hetta eitt luttøkuprosent uppá 69,8%. Tað vóru 45 brævatkvøður og við uppteljingina vóru 13 atkvøðuseðlar ógildagir.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Listi A: | | Listi B: | 2 atk. |
| Eivin H. Jacobsen | 59 atk. (3.) | Erik Davidsen | 33 atk. |
| Petur Kruse | 94 atk. (1.) | Herálvur Jacobsen | 33 atk. (2.L) |
| Jákup S. Lauritsen | 22 atk. | Pauli Jensen | 17 atk. |
| Rasmus Mouritsen | 1o atk. | Høgni Nielsen | 7 atk. |
| Lis Olsen | 6 atk. | Eydna Poulsen | 5 atk. |
| Kristian Olsen | 35 atk (5.) | Mikkjal Simonsen | 6 atk. |
| | | Eyðin Thomassen | 18 atk. |
| Listi C: | 1 atk. | | |
| Sólva Thomassen | 31 atk. (4.) | | |
| Laila Simonsen | 9 atk. | | |
| Elsa M. Davidsen | 7 atk. | | |
| Eiley Hansen | 9 atk. | Poula Davidsen | 1 atk. |
| Randi Zachariassen | 8 atk. | Elisabeth Falkvard | 3 atk. |
| Amy Jacobsen | 3 atk. | Eyð Niclasen | 11 atk. |

**Skúlanevndarval:**

| | |
|---|---|
| Listi A: | |
| Arnjohn Hvíttklett | 46 atk. (2.) |
| Kirstin Jensen | 21 atk. (5.) |
| Sigrun Mikkelsen | 139 atk. (1.) |
| Jógvan Steintún | 18 atk. |
| Listi B: | 1 atk. |
| Arngerð Davidsen | 17 atk. |
| Hildigunn Niclasen | 20 atk. |
| Eydna Poulsen | 16 atk. |
| Rannvá á Ørg | 21 atk. (4.) |
| Listi C: | 1 atk |
| Sólva Thomassen | 30 atk (3.) |
| Laila Simonsen | 11 atk. |
| Elsa M. Davidsen | 8 atk. |
| Eiley Hansen | 5 atk. |
| Kristina Gásdal | 8 atk. |
| Amy Jacobsen | 3 atk. |
| Unn Simonsen | 13 atk. |
| Randi Zachariassen | 5 atk. |

**Aftur** í ár var hetta ein roynd at kunna okkara bygdafólk eitt sindur um farna árið, og eru tað nøkur, íð sakna ella ynskja meira vitan av almennum áhuga, ber til at venda sær til skrivstovuna.

**Tað** skal verða sagt, at vit fegnast og gleðast saman við teimum, har lagnan hevur verið til vildar, meðan vit drýpa høvur í samkenslu við teimum, íð hava fingið lívsins beiskleika at kenna bæði á ein og annan hátt, og at enda verður ynskt øllum bygdafólkunum eitt av Harranum vælsignað nýggjár í vónini um bjarta framtíðarvón fyri okkum øll.

SØRVÁGS KOMMUNA
Petur Kruse
Petur Kruse, form.




Telefon: **32004** og **33122** Telefax: **32952**

Uppskotið hjá Herálvi Jacobsen íð fekk 3. virðisløn



Uppskotið hjá Jákup Ebholm Hansen (2. virðisløn)


Nettoskuld 1986-96
Inntøkur 1986-96
1.000 kr.
50.000
45.000
40.000
35.000
30.000
25.000
20.000
15.000
10.000
5.000
0
45.000
41.498
42.113
40.456
37.327
36.214
36.468
36.644
36.930
35.609
39.366
36.679
38.205
35.453
35.679
Skuld brutto
32.843
29.001
31.732
30.529
Skuld netto
25.890
19.860
19.503
16.354
16.106
15.025
14.378
13.228
Inntøkur
14.616
13.889
15.166
14.720
14.388
14.196
13.939
12.442
7.467
4.819
Ogn
6.953
1.874
5.634
3.908
4.777
4.912
6.401
1986
1987
1988
1989
1990
1991
1992
1993
1994
1995
1996
ár
Ogn
Skuld
Nettoskuld
Inntøkur


Ogn 1996
í 1.000 kr
Skuldarar
880
Útlán
1.562
Kreppuláns-grunnurin
1.919
Tøkur peningur
2.592

# FÍGGJARÆTLAN 1997 Sørvágs kommuna 29-11-1996

| 1995 | J.nr.96-11-04 | | 1997 |
|---|---|---|---|
| **73.000.000** | **Skattskyldug inntøka:** | **71.500.000** | **84.054.000** |
| **23,00%** | **Skattaprosent:(21+0,25)%** | **21,00%** | **21,3%** |
| **2.500** | **Barnafrádráttur:** | **2.500** | **2.500** |
| 0,05% | **Kirkjuskattur:** | **0,05%** | **0,25%** |

| Roknskap. 1995 | | Bóka: 30-09-1996 | Meting 1996 | Fíggjarætlan 1997 |
|---|---|---|---|---|
| | RAKSTUR: | | | |
| 47.544 | 1000. Byggibúnning | 9.882 | 13.176 | 80.000 |
| 139.623 | 2000. Kommunal virkir | 233.961 | 370.246 | 525.456 |
| 1.707.773 | 3000. Teknisk mál | 1.526.946 | 1.858.443 | 2.010.406 |
| 2.084.384 | 4000. Skúla- og mentunarmál | 1.425.066 | 2.053.297 | 2.102.572 |
| 2.059.030 | 5000. Almanna- og heilsumál | 704.250 | 2.143.422 | 2.232.726 |
| 1.102.580 | 6100. Kommunala fyrisitingin | 1.005.020 | 1.191.846 | 1.403.772 |
| **7.140.934** | **A. RAKSTUR SAMANLAGT** | **4.905.125** | **7.630.430** | **8.354.932** |
| | ÍLØGUR: | | | |
| 21.885 | 1000. Byggibúning | 21.276 | 28.368 | 60.000 |
| 72.726 | 2000. Kommunal virkir | 106.026 | 404.636 | 480.000 |
| 320.423 | 3000. Teknisk mál | 84.732 | 242.744 | 445.000 |
| 57.793 | 4000. Skúla- og mentunarmál | 77.348 | 90.105 | 120.000 |
| 0 | 5000. Almanna- og heilsumál | 18.200 | 20.000 | 20.000 |
| 42.344 | 6000. Kommunala fyrisitingin | 3.137 | 4.000 | 10.000 |
| **515.171** | **B. ÍLØGUR SAMANLAGT** | **310.719** | **789.852** | **1.135.000** |
| 7.656.105 | RAKSTUR & ÍLØGUR | 5.215.844 | 8.420.282 | 9.489.932 |
| **3.390.334** | **C. RENTUR** | **1.679.991** | **2.210.011** | **2.064.299** |
| | **D. FÍGGJARBROYTINGAR** | | | |
| 1.753.522 | Goldin Veðhald | 0 | 0 | 0 |
| 649.931 | Goldi í kreppulánsgrunn | 478.483 | 650.000 | 650.000 |
| 997.587 | Øking av likvidum | 668.822 | 905.886 | 878.642 |
| 564.442 | Aðrar fíggjarbroytingar | 2.424.702 | 1.516.759 | 650.000 |
| **3.965.482** | | **3.572.007** | **3.072.645** | **2.178.642** |
| **713.976** | **E. AVDRÁTTIR AV LÁNUM** | **989.944** | **1.337.985** | **988.740** |
| **15.725.897** | **ÚTREIÐSLUR ÍALT:** | **11.457.787** | **15.040.923** | **14.721.613** |
| | **F. FÍGGJAN** | | | |
| 0 | Hall at fíggja | 0 | 0 | 0 |
| -1.753.522 | Lántøka | | | |
| 0 | Minking av likvidum | | | |
| -33.093 | Avdráttur av útlánum | -18.088 | -33.100 | -25.000 |
| 0 | Aðrar fíggjarbroytingar | | | |
| -13.939.282 | Skattur | -11.439.699 | -15.007.823 | -14.696.613 |
| **-15.725.897** | **INNTØKUR ÍALT** | **-11.457.787** | **-15.040.923** | **-14.721.613** |
| 0 | Javnvág | -0 | 0 | 1 |
| 1.124.245 | ÚRSLIT áðrenn avdrátt | 4.543.863 | 4.362.529 | 3.127.382 |